tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Høg tøl

## *Oddagrein*

Danski ríkiskassin spardi 90 milliardir krónur frá 1975 til 1989 í útreiðslum til hernaðarmál, tí danska stjórnin gav NATO loyvi at byggja og reka hernaðarstøðir í Grønlandi og í Føroyum. Tey nýggju tølini vóru høvuðsboðini á einum tíðindafundi, sum landsstýrið hevði fríggjadagin.

Flestu føroyingar hava havt ein illgruna um, at danska ríkið hevur spart verjuútreiðslur í NATO-høpi, tí verjusamgongan í Norðuratlanthavi fekk loyvi at byggja og reka loranstøðir og radarstøðir í Føroyum og í Grønlandi í Kalda kríngnum. Men hvussu nógv, Danmark hevur spart, hevur ikki verið greitt, men summi hava kortini dittað sær at gita nøkur tøl, hóast stór óvissa hevur verið um tey.

Nú hevur so landsstýrið gjørt eina kanning, og eru hesi tølini eftirfarandi - ella nøkurlunda eftirfarandi - so hevur danska ríkið spart nógvan pening. NATO hevur í Føroyum havt støð síðani í 1960, ella 15 ár undan tí ári, tá tølini hjá landsstýrinum taka við. Harafturat koma so tølini frá 1989 og fram til dagin í dag. OG tey eru ikki við í kanningini.

Grundarlagið undir útrokningum er NATO-avtalan um, at limalondini skulu brúka trý prosent av bruttotjóðaúrtøkuni til verjumál, men tølini vísa, at Danmark hevur brúkt minni. Munurin er so tulkaður til at verða tað, sum Danmark hevur spart. Sjálvandi kann spurnartekin setast við henda háttin at rokna sparingarnar, tí tað eru onnur limalond enn NATO, sum hava brúkt minni enn trý prosent av BTU til verjumál.

Tað er so eitt, men ein annar spurningur er, hvat ætlar landsstýrið at brúka hesi tølini til? Skulu tey brúkast í samráðingunum fyri at prógva, at danski ríkiskassin hevur ikki brúkt pening til Grønland og Føroyar, tí heildarveitingarnar eru lægri enn tær 30 milliardirnar, sum Danmark hevur spart við at hava givið NATO loyvi at gera støðirnar í Noðuratlantshavi? Nei, tað skulu tey ikki, sigur løgmaður. Men hví verða tey so kunngjørd nú?

Tað er, sum Jóannes Eidesgaard segði í Fimmaranum í síðstu viku, vandamikið at fara at brúka slík tøl í samráðingunum, tí øvugt kunnu danir fara at brúka onnur tøl ímóti okkum.

Hinvegin er tað gott, at slíkar útrokningar verða gjørdar. Hetta er so eitt útspæl, sum danskir politikkarar, ella danskir myndugleikar, vónandi vilja gera viðmerkingar til. Góðtaka ella mótprógva. Vit vita jú frá frágreiðingini frá kanningini "Føroyar í Kalda kríngnum", at danir sluppu lættari í NATO, tí Danamark lat Føroyar og Grønland hýsa herstøðum - ella vera bumbumál hjá sovjettiskum flogførum ella kavbátum, sum onkur vil siga tað.

Nú er sett hol á eitt eymt mál, sum eirindarleyst hevur verið brúkt í politiskari propaganda. Lat okkum fáa kanningina "Føroyar í Kalda kríngnum" gjørda lidna og skrivaða og fáa hesi nýggjastu tøli prógvað. Anars hava tey ov lítið virði.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# »Havnin spurtar frá«

Tack Áki Bertholdsen för en intressant och välskriven artikel om musikskolan på Färöarna i Sosialurin den 24.2.2000. Det är glädjande att man mer och mer diskuterar musik och kultur överhuvudtaget, eftersom just den sidan av dagens samhälle på Färöarna fått en helt för liten ekonmisk del av den allmänna kakan.

**Typiskt havnarfólk**
Men artikeln slutar dessvärre ändå så typiskt. ”Havnin spurtar frá...”. Här säger musikskoleledaren Martin Mouritsen att ”tad er rattliga stórur munur á musikkskúlanum í Havn og á bygd”. Några frågor kommer genast upp: vad baserar sig detta uttalande på? Finns det någon kvalitetsundersökning om saken och är resultatet lika för hela landet? Vetande att en sådan undersökning knappast är gjord, kan man kanske hellre fråga sig: vad beror det i så fall på att det är stor skillnad på musikskolorna? Eller har Martin Mouritsen bytt tidigare praxis och istället varit ute på bygden och besökt lokala musikskolor? Varför nämner Martin Mouritsen inte att det till tider är verkligen svårt att hålla elever i musikskolan, när lärarna skiftar lika ofta som årstiderna. Ett exempel från Musikkskúlanum í Vágum: flöjtlärarna varit 7 till talet under en tidsperiod på 4 år. Hur kan barnen få något som helst ut av det?

**Problem med resande musiklärare**
Till saken hör att man gör ingenting för att förbättra arbetsvillkoren för de resande lärarna. Hur kan en lärare boende i Tórshavn, som suttit mellan en och två timmar i bil, engagera sig i undervisningen på bygden och deltaga i att bygga upp ett musikliv, maken till det i Havn? Det är svårt och leder i många tillfällen till att en lärare inte trivs med sitt arbete, utan vill byta till ett mera stabilt arbete i Havn. Bara som en kuriositet: vilka folkskolelärare hade varit villiga att resa så mycket som lärarna i musikskolan gör?

**Vad kan man då göra?**
Kommunalpolitikerna har faktiskt bollen i detta fall. Om bygdaråden kring landet hade en seriös önskan om att få mera ut av musikskolan och dessutom själv höja anslagen för musikskolan, kunde detta förhoppningsvis leda till en dominoeffekt för hela landet. Om anslagen höjs kommer flere musiklärare att kunna sättas i tjänst över hela landet. Detta leder till större lokal trivsel och ett lokalt musikliv, som kan komma i blomstring som aldrig förr. Alfa och omega i saken är alltså att få musiklärare utstationerade på bygden med fulltidstjänster. I områden med glesare bebyggelse kan man försöka enas om olika musikaliska/ geografiska centra, som kan fungara som en smältdegel för musik i området. Det är säkert OK för barn att använda litet tid till att resa till sin musikundervisning — vad gör de och deras föräldrar inte för sina barn exempelvis då vi pratar om idrott.

**Landstyret**
Landsstyret uppfattar enligt min mening nog musikskolan som något nödvändigt ont och har inte så stor kontroll över vad som sker på bygden, ungefär som i det engelska uttrycket”no news is good news”. Landstyret får ju sin årliga musikkskúlastevna i Havn och då måste allt vara bra, om *så* många elever och *så* många lärare får *så* mycket gjort på 2 dagar. Därför är det viktigt att få signaler från hela landet i denna fråga. Landstingets ledamöter från bygden har gjort ett minst sagt neutralt och intetsägande arbete vad gäller musikskolorna på deras eget område. Det måste komma en kvalitativ diskussion och seriös inställning om musikskolan på Färöarna.

**Kritik**
Till sist vill jag rikta kritik mot Landsskolemusikledaren Martin Mouritsen om artikeln i fråga . För en musiklärare boende och arbetande ute på bygden är det verkligen nedvärderande att en landsskolemusikledare kommer med kommentarer som de framförda i artikeln om deras arbete. Det är ju inte på detta sätt som musikskolan skall byggas upp på Färöarna, utan hellre genom frågeställningen: vi har ett problem - vad kan vi göra?

**Med vänlig hälsning**
**Stefan Simonsen**
**Nordens Institut**
**i Grönland**

# Nútímansgera tinglýsingina

*Tað, at allar upplýsingar, ið ikki longur eru aktuellar, ikki koma við, og at veðbindingar verða settar í porioritetsordan, er nýtt í mun til galdandi tingbókarskipan, og fer væntandi at gera tingbókina nógv greiðari og nýtiligari í praksis, sigur Høgni Hoydal í viðmerkingum til nýggju tinglýsingarlógina*

ÓLAVUR Í BEITI

Teksturin er drúgvur í nýggja uppskotinum hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, viðvíkjandi nýggju tinglýsingarlógini, og sigur Høgni Hoydal at tveir høvuðstættir eru í lógaruppskotinum. Fyrst og fremst broyting í tinglýsingarlógini við innføring av edv-tinglýsing fyri eyga, og so ávísar ásetingar viðvíkjandi edvnýtslu, kunning og fremjan av edv-verkætlanini.

– Eftir galdandi skipan er tinglýsingin ein almenn skráseting av skjølum viðvíkjandi rættindum í fastari ogn, leysafæ ella ognarviðurskiftunum hjá persóninum. Til skrásetingina er knýtt ein røð av rættarfylgjum, fyrst og fremst í mun til triðjamann. Tinglýsing er føroyskt sermál. Av praktiskum orsøkum stendur Sorinskrivarin tó fyri tinglýsingarverkinum. Tinglýsing er ein rættarlig uppgáva, greiður Høgni Hoydal frá.

**Dagbók**
Og víðari verður sagt, at tinglýsingarliga skrásetingin fer í dag fram á leysbløðum. Henda skipan, ið er grundað á pappír, hevur í høvuðsheitinum verið óbroytt síðani tinglýsingarlógin kom í gildi.

– Við fáum undantøkum verða øll skjøl, ið verða móttikin til tinglýsing, førd í dagbókina. Við hesum kann móttøkudagurin staðfestast og síggjast kann hvussu skjølini í tíð eru innkomin, soleiðis at eingin ivi stendst um hetta. Eftir innføringina í dagbókina ger Sorinskrivarin ta tinglýsingarligu kanningina. Talan er um eina løgfrøðiliga kanning, har støða skal takast til, um skjalið eftir sínum innihaldi, áður lýstum rættindum ella lóggávuni annars er nakað til hindurs fyri, at skjalið verður lýst á tann hátt, sum tilmeldarin ynskir.

**Ikki pappírleyst**
Og Høgni Hoydal metir, at tað framhaldandi verður arbeitt við tinglýsingarskjølum úr pappíri. Við tíðini fer tó at verða møguligt at hava pappírsleysa tinglýsing. Og tann elektroniska tingbókin skal bert hava aktuellar upplýsingar. Skotið verður upp, at upplýsingar um avlýstar og strikaðar heimildir verða fluttar til eina serstaka »søguliga« skrá.

– Tað er ein grundleggjandi eginleiki við tinglýsingarskipanini, at upplýsingarnar hjá tinglýsingarverkinum eru almennar fyri borgaran, fyritøkur og myndugleikar, uttan at tað vanliga verða settar serstakar treytir fyri at fáa upplýsingarnar. Soleiðis kunnu øll fáa upplýsingar um innihaldið í dagbókini, tingbókini og persónbókini við persónliga at venda sær til tinglýsingarskrivstovuna, við at biðja um útskriftir, heruppií eina fullfíggjaða tingbóksváttan og – við nøkrum praktiskt grundaðum avmarkingum – gjøgnum telefon.

– Afturat hesum kemur, at stuttar fráboðanir um øll heimildarskjøl og veðbrøv, ið verða fráboðað til tinglýsing, verða almannakunngjørdar í tinglýsingarlistanum, sigur Høgni Hoydal í viðmerkingunum.

Og at enda verður sagt, at av bæði dátu og rakstrartrygdarligum orsøkum fara dátur dagliga at verða fluttar frá upprunaligu tingbókini til eina teldu, sum fyrispurningar frá almenninginum fara til. Henda telda er í Danmark og hevur samsvarandi upplýsingar frá øllum donskum rættardømum.

**3,7 mió. kr**
Upplýst verður hartil, at útreiðslurnar til starvsfólk og tilfar hjá tinglýsingini verður rindað av ríkiskassanum, tó soleiðis at inntøkurnar av tinglýsingargjaldi er 100 kr. Sambært fyriskipan frá 8. februar 1810 skal harumframt við sølu av fastari ogn rindast eitt egindómsgjald og fellur hetta gjald somuleiðis til ríkiskassan. Inntøkurnar frá hesum gjøldum vóru í 1997 3.648.984 kr. Útreiðslurnar í sambandi við stovnan av edv-tinglýsingarprojektinum viðvíkjandi fastari ogn verður rindað av ríkiskassanum og fer sostatt ikki at hava útreiðslur við sær fyri landskassan.






**Kendi danski vinnulívsmaðurin Asger Aamund heldur fyrilestur**

## Vinnudagur í Norðurlandahúsinum

# ÁRSINS VIRKI

Eftir harðbalnar tíðir gongur nú aftur framá hjá føroyska vinnulívinum. Vit eru komin til eitt vegamót við stórum rembingum. Sjónarringurin verður alsamt víðkaður við nýggju kunningartøknini. Oljuvinnan er komin á okkum. Og ríkisrættarligar broytingar standa fyri durum. Í strembanini at gera føroyska vinnulívið enn betri ført fyri at fáa sum mest burtur úr hesum rembingum, hevur Vinnuhúsið valt at halda ein vinnudag fríggjadagin 7. apríl.



Á hesum degi verður Ársins Virki valt. Innbodnir føroyskir røðarar fara at geva teirra boð upp á framtíðina, og kendi danski vinnulívsmaðurin Asger Aamund fer at siga sína hugsan um framtíðarsamfelagið og krøv til vinnuna.
Ert tú vinnulívsfólk og kundi hugsað tær at luttikið á vinnudegnum í Norðurlandahúsinum, so set teg í samband við Vinnuhúsið áðrenn 27. mars. Kostnaður fyri tiltakið við døgverða er 800 kr.

**Skrá fyri vinnudagin:**

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00-13.15 | Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag bjóðar vælkomin, Wilhelm M. Johannesen |
| Kl. 13.15-15.00 | Framløgur um føroyska vinnu og framtíðina: |
| | Fiskivinnan - framtíðar gongdin innan høvuðsvinnuna, Meinhard Jacobsen |
| | Hava smáar og fjarskotnar fyritøkur eina framtíð? Magni Arge |
| | Kunningartøknin - rembingar, ið ávirka vinnuna, Niels Chr. Nolsøe |
| | Ein framtíð uttan heimamarknað, Kjartan Kristiansen |
| | Útvegan av eginkapitali Vilhelm Petersen |
| Kl. 15.00 | Steðgur - kaffi o.a. |
| Kl. 15.40-16.00 | Vinnulív, vinnupolitikkur og framtíðin, Anfinn Kallsberg, løgmaður |
| Kl. 16.00-16.40 | Framtíðarsamfelagið og krøv til vinnuna, Asger Aamund |
| Kl. 16.40 | Ársins virki: Hví velja ársins virki, Jan Mortensen |
| | Umboð fyri dómsnevndina greiður frá arbeiðinum. Framløga - ein lýsing av útvalda virkinum. Landsstýrismaðurin í Vinnumálum handar ársins virki virðisløn. |
| Kl. 19.00-24.00 | Døgurði fyri luttakarum á Vinnudegnum á Hotel Føroyum |

VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*
R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, fag@industry.fo